# Úttøkukapping til bridgelandsliðið

**BRIDGE** Í næstu viku verður úttøkukapping til bridgelandsliðið, sum skal til NM í Örebro í Svøríki síðst í mai. Spælt verður tilsamans í 24 tímar og skulu í alt spælast 160 spøl



Randi Jacobsen

Seks pør fara mikukvøldið, skírisdag og langafríggjadag spæla um tey trý plássini á landsliðnum, sum skal til Örebro at luttaka í norðurlandameistarakappingini.

– Endamálið við at senda eitt bridgelandslið til norðurlandameistarakapping er at geva okkara bestu spælarum nýggjar avbjóðingar og altjóða royndir, sigur Øssur Winthereig, formaður í Føroya Bridgesambandi.

**SKÍGGI**

*Úttøkukapping til landsliðið í bridge. Spælt verður við skíggjum, so makkarnir ikki síggja hvønn annan*

– Men endamálið er eisini at vinna dystir. Bridge er ein hugaítrót, har tveir góðir ella fýra góðir spælarar kunnu geva okkum altjóða úrslit, sigur hann.

## Smáar tjóðir kunnu eisini

Danski bridgespælarin og telvarin, Svend Novrup, sum hevur átikið sær at vera landslðsvenjari, kemur til Føroya í hesi vikuni.

– Vit skulu ikki við fyri at spæla hugnabrigde og vóna at kortini onkuntíð geva okkum góð úrslit. Vit skulu spæla bridge og vísa, at smáar tjóðir eisini kunnu gera seg galdandi, sigur Svend Novrup, landsliðsvenjari.

Úttøkukappingin er skipa, sum NM-kappingin við 10 umførum við 16 spølum. Spælt verður við skíggjum, so spælarnir ikki síggja makkaran. Kappingin verður gjørd upp eftir prinsippunum í eini liðkapping.

## Trý pør á landsliðið

Vinnandi parið og nummar tvey spæla seg beinleiðis á landsliðið. Svend Novrup og FBS velja triðja parið.

Spælararnir, sum er við eru: Jóannes Mourtisen-Egil Sondum, Rúni Mouritsen-Bjarni Johansen, Árni M. Dam-Símin Lassaberg, Heðin Mouritsen-Rói á Rógvu Joensen, Dia Jacobsen-Eyðun Anthoniussen og Jens Midjord-Jákup Hjaltalin. Seinasta parið er við sum venjingarpar.

Útøkukappingin verður í Bridgehúsinum og áskoðarar eru vælkomnir framvið.

*randi@sosialurin.fo*

---

# Norðurlendskt bindskeið við Gjógv

**BINDING** 100 norðurlendskar kvinnur hava teknað seg til bindiskeiðið á Gjáargarði í juli. Føroyingar kunnu framvegis tekna seg

Randi Jacobsen

Í døgunum frá 4. til 10. juli verður eitt stórt skeið í binding og aðrari tilvirkan av ull hildi á Gjáargarði við Gjógv.

Higartil hava yvir 100 fólk úr Svøríki, Finnlandi, Danmark og Noregi, og haraftrat koma kvinnur úr Japan og Korea við á skeiðið.

Tey fara øll at gista á Gjáargarði og á Hotel Eiði.

Av ókndari orsøk eru boðini um skeiðið ikki komin nóg væl út í Føroyum, siga fyrireikararnir.

Føroyingar eru væl komnir við og kunnu framvegis tekna seg hjá arni@sirri.fo

Á skeiðinum verða 20 ymiskar verkstovur, har undirvíst verður í nógvum ymiskum tilvirkingum av tógvi og ull. Eisini verður greitt frá nýggjum mátum at sniðgeva bindimynstur, sum gevur íblástur at arbeiða meira við.

12 kvinnur hava átikið sær at undirvísa á verkstovunum. Seks teirra eru úr Føroyum, tvær úr Danmark, ein úr Hollandi og ein føroysk-svensk kvinna.

Umframt verkstovurnar verða fleiri fyrilestrar um ull og ullvirking, binding o.a. og um føroyska mentan.

*randi@sosialurin.fo*

---

# Beinagrindin skal reinsast

**HVALUR** Fyri fyrstu ferð er nevhvalurin við navninum Cuvier skrásettur í Føroyum



*Mynd: Bjarni Dam*

Randi Jacobsen

Leygardagin rak ein deyður stórhvalur inn í Leynum, og hvalurin hevur helst verið deyður leingi, tí hann var klúgvandi rotin.

Mánadagin fóru fólk av náttúrugripasavninum eftir rotna hvalinum, sum ramur roykur stóð frá.

Hvalurin varð lyftur upp á ein kranabil og koyrdur til Kaldbaks.

Har er beinagrindin løgd at rota, og hon verður síðan reinsað.

Møguleikin skuldi verið góður fyri at sett beinagrindina saman aftur, sigur Bjarni Mikkelsen, lívfrøðingur á Føroya Náttúrugripasavni.

Hetta er fyrstu ferð, at hesin hvalur er sæddur á okkara leiðum. Hesin var ein hálvvaksin hannhvalur, sigur Bjarni Mikkelsen.